# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-085_7.2
dags. 09-02-2011

**Mentamálaráðið**
**Att: Hildur Patursson**

hildur mmr.fo

***Viðv.: Tygara mál um uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt***
Felagið hevur móttikið uppskotið 03-02-2011 og er málið viðgjørt á stýrisfundi 08-02-2011.

Kommunufeløgini hava fyrr í ár verið á fundi við Mentamálaráðið, at umrøða leiðsluspurningin á dagstovnaøkinum. Í hesum sambandi hava feløgini gjørt greitt, at átrokandi er at broyta dagstovnalógina soleiðis, at møguligt er hjá kommununum, at leggja námsfrøðiligu leiðsluna á dagstovnaøkinum í kommununi undir eina felags leiðslu.

Talan er altso um broytingar í lógini, so ber til at hava eina felags leiðslu fyri dagrøktina og dagstovnarnar í kommununi.

Við støði í galdandi lóg er hettar ikki møguligt. Fyriliggjandi uppskot leggur heldur ikki upp til hettar, tá heimild bert verður givin at leggja dagrøkt og dagstovn í smærri kommunum undir somu leiðslu.

Felagið metir ikki, at fyriliggjandi uppskot er í tráð við ynskini hjá kommunufeløgunum og tað, sum er komið fram í fundunum við Mentamálaráðið.

Skotið verður tí upp, at uppskotið fyribils verður tikið aftur, og at Mentamálaráðið, í samstarv við kommunufeløgini, orðar nýtt uppskot, har støða verður tikin til møguleikan fyri einari felags leiðslu fyri dagstovnaøkið í kommununi.

fyri felagið

Asbjørn Djurhuus, formaður

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo